

**Bjørn Kalsø**
*løgtingsmaður*

# Fiflast við fiskiloyvum

Makrelmálið er framvegis heitt! Hini londini leggja órímiligt trýst á okkum og landsstýrismaðurin fiflast framvegis óneyðuga við fiskiloyvum.

Tað tók langa tíð at taka avgerð um at áseta makrelkvotu. Orsøkin var m.a. mótstøða frá formanninum í uttanlandsnevndini, John Johannesen, Javnaðarflokkinum í samgongu, andstøðuni og pørtum av vinnuni við.

Sínámillum bardagin millum veiðubólkar um, hvør skuldi fiska makrelin bøtti heldur ikki um støðuna.

Vandi var fyri, at makrelmálið datt á gólvið. Hetta vísti eg á í grein nevnd "Makrelguff ella tránað makrelsuppa" fyrr í summar. Tá mælti eg til at standa saman, taka støðu og lata verandi uppisjóvarskip sleppa at fiska.

Kvotan varð ásett, uppisjóvarskipini fóru at fiska, og fiskiskapur og søla hava gingið væl, hóast órímiligt trýst úr ES og Noreg við landingarforðingum og havnarstongsli.

Gudarnir munnu vita, hvør orsøkin er til gávumildni

Eftir øllum sólarmerkjum at døma megna føroysku uppisjóvarskipini at fiska sínar kvotur og reiðiliga tað. Tí er undrunarvert, at landsstýrismaðurin aftur er farin at fiflast við fiskiloyvum, nú boð eftir øllum at døma eru send risaskipum úr Suðurkyrrahavi at fiska makrel her.

Stál hava vit ov mikið av í flotanum! Tí munnu gudarnir vita, hvørjar grundgevingarnar hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, eru til gávumildni á hesaferð?

## Nóg mikið av stáli

Fiskiskapurin er so mikið góður, at kvoturnar hjá uppisjóvarskipunum skjótt verða uppfiskaðar, um fiskiskapurin heldur sær.

Aðrir skipabólkar, sum hava fingið kvotu tillutaða, hava ikki fiskað makrel enn. Tað kann hava við sær, at samlaða kvotan ikki verður uppfiskað.

Í samráðingarhøpi er eingin fyrimunur, um partar av kvotuni liggja eftir. Landsstýrismaðurin átti tí beinanveg at gjørt smidligar skipanir, soleiðis at uppisjóvarskipini kundu hildið fram við fiskiskapinum, heldur enn at fiflast við nýggjum fiskiloyvum til skip, sum ongantíð fyrr hava fingið lyfti um at sleppa í føroyskan sjógv at royna.

Er tað so, at orka manglar til at framleiða makrelin til matna, kundi tann spurningurin verið viðgjørdur.

Stálið til fiskiskapin hava vit. Tí er óneyðugt at taka fleiri skip í flotan at fiska nú.

Tá nýggj loyvi eru givin, ber ikki til at taka tey aftur. Ta søguna kenna øll!



**Jenis av Rana**
*floksformaður, vegna Miðflokkin*

# Onki rættvísger ágang móti teim veiku!

*Ein áminning til teirra, sum í miðlunum royna at finna undanførslur fyri atgerðirnar móti teimum á niðastu samfelagsrókunum*

Tað tykist summum umráðandi at finna onkran at krossfesta. Men um so allar orsøkir, ið brigslaðar verða mær ella øðrum, skuldu víst seg at verið rættar, so rættvísger tað tó aldrin tey átøk, sum nærum dagliga verða sett í verk móti veiku borgarum okkara!

## Raðfesting

Fremsta uppgáva teirra, ið skipa samfeløg, er at skipa tey so, at øll kenna seg trygg, heilt frá gitna og til ellisár. Avgerandi er m.a. at raðfesta rætt. Tær uppgávur, ið eru mest neyðugar, mugu setast fremri enn tær, ið kunnu bíða.

Tá talan er um raðfesting tykist landsins leiðsla heilt at hava mist fótafestið. Frásagnirnar, ið eru komnar undan kavi, um oyðsl landsstýrismanna við nevndarsamsýningum og flogferðum, samstundis sum ætlanir verða lagdar um niðurskurð á eldraøkinum, eru góð dømi um manglandi raðfesting.

Flestu játta at skeivt er farið fram, onnur kanalisera ringu samvitskuna í øði móti øðrum. Tað er ikki rætt, tí um so fleirfaldar misgerðir skuldu hingið á herðum teirra, ið gera vart við samfelagsligar skeivleikar, so heimilar tað ikki fyrilitarleysum niðurskurðum ella manglandi raðfestingum.

## Okkum tørvar nýggjan sosialpolitikk

Sosialpolitikkurin má grundleggjandi endurskoðast. Vónirnar at verandi politiski meirilutin megnar hetta er lítil. Men útlitini fyri nýggjari manning í Tinganesi eru væl bjartari í dag enn fyri fáum døgum síðani. Tá verður fyrsta takið at fáa hjartað innaftur í føroyskan sosialpolitikk.



**Heri Mohr**

# Impotent samgonga

Nú um dagarnar var ein drúgv grein – ABC: tá ruðuleiki verður normur – undirskrivað av Heina í Skorini, MA í samfelagsfrøði og religión.

Kvintessensur í greinini er ein analysa av okkara løgmanni, Kaj Leo Johannesen.

Men fyrst fáa vit at vita, at ABC-samgongan er impotent, heterogen, og at hon hevur mist sína orsøk at vera til.

Um eg skilji greinina beint, so er orsøkin til impotens í tí politisku samleguni í stóran mun orsakað av: løgmansins dugnaloysi, naiviteti og øðrum niðrandi predikatum frá hansara politisku mótstøðufólki. Greinskrivarin vil eisini vera við, at okkara løgmaður ikki er førur fyri at orða eitt ítøkiligt svar upp á einfaldar spurningar, sum verða settir honum frá løgtingsins røðarapalli (har andríkar talur verða frambornar og ditto spurningar settir).

Í greinini verður eisini sligið fast, at okkara løgmaður er vorðin ímynd av einum anti-leiðara (hvussu tað so skal skiljast), ein yvirfladiskur kransakøkufigurur. Eingin í tí politisku skipanini kann hava virðing fyri manninum (!!). Vil greinskrivarin vera við.

Vit kunnu hugsa okkum ein serlækna, sum í longri tíð hevur stríðst við at hjálpa einum niðurundirkomnum sjúklingi, og at hjálp og betring ikki er sjónlig fyri uttanfyri standandi fólki. Vildi tað so ikki verið óheppið og býttisligt ikki at givið serlæknanum arbeiðsnáðir?

Ella hetta at burturbeina, tveita almennan pening burtur: Serlæknaviðgerðir á Ríkishospitalinum og øðrum sjúkrahúsum í Danmark vórðu allar fíggjaðar av ríkiskassanum (í blokkinum) til 1. januar 2002. Frá hesum degi steðgaði løgtingið allar lógar- og sáttmálabundnar reguleringar (dýrtíð v.m.) av ríkiskassans stuðli til vital øki – tað vil siga heilsu-og almannaøki – í okkara samfelagi. Og frá hesum degi og til dagin í dag hevur eitt standandi stríð og knoss og kaos – samanberið tær rædandi hendingarnar, sum beint nú fara fram á Landssjúkrahúsinum – staðist av peningatroti til nevndu, annars væl virkandi øki. Takkað veri politiskum dárskapi og puerilum, men sera hættisligum kenslum.

Býttlingasøgur um moldbúgvar renna okkum í hug.

Satt at siga høvdu mong roknað við, at Heini í Skorini varð tann komandi objektivi, professionelli politiski kommentatorurin, sum vit í Føroyum so átrokandi hava manglað, kanska eina mest síðani 1992 til dagin í dag. Men ein slíkur kommentatorur má seta seg væl og breitt inn í føroyskan politikk við fyrisiting og umsiting á øllum økjum og liðum í tátíð og nútíð, um hann skal verða tikin í álvara.

Greinin hjá harra í Skorini kundi ruddiliga ligið á einum hægri støði og verið meira konstruktiv og minni destruktiv. – Try, try and try again. Never say die!